

[Endurlýsing]

# Betong skapar eisini bleyt virðir

## Landsverk søkir eftir verkfrøðingi ella byggifrøðingi til framleiðsludeildina

Hørðu virðini sum vegir, tunlar og brýr eru á mangan hátt ein fyritreyt fyri at kunna røkja bleytu tænasturnar í samfelagnum. Vilt tú út-byggja og viðlíkahalda samfelag okkara á báð-um hesum økjum, hevur tú møguleikan nú. Vit kunnu bjóða eitt spennandi og áhugavert starv, ið er fakliga og persónliga mennandi og við góðum arbeiðsumstøðum.

**Arbeiðsøkið**
Í høvuðsheitum fevnir arbeiðsøkið um at:
- gera kostnaðarmetingar og eftirkalkulatiónir av asfalt- og anlegsarbeiðum
- skipa fyri viðlíkahaldi av skervverkunum kring landið og asfaltverkinum í Hundsarabotni

**Førleikakrøv**
Tú hevur útbúgving sum verkfrøðingur ella byggifrøðingur og hevur áhuga í at arbeiða við KT. Stórur dentur verður lagdur á góðar persónligar eginleikar so sum góð samstarvs-evni, sjálvstøðugt arbeiðslag, teldukunnleika á brúkarastigi, framfýsni og evni at menna arbeiðsplássið saman við starvsfeløgunum.

**Setanarviðurskifti**
Løn og setanartreytir annars eru sambært sátt-málanum ímillum Fíggjarmálaráðið og avvarandi yrkisfelag.

**Umsóknir**
Umsóknir við prógvum og lívsgongdarlýsing (CV) verða at senda til lv@lv.fo ella:

Landsverk,
Postmoga 78,
FO-110 Tórshavn,

og skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi 25. mars 2008. Merk umsóknina „starv á framleiðsludeildini" og viðmerk í umsóknini, hvar tú hevur sæð starvslýsingina. Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði.



**Fleiri upplýsingar**
Fleiri upplýsingar um starvið fáast við at ringja til Torkil Olsen, deildarleiðara, telefon 540 841, ella umvegis teldupost á to@lv.fo.

SENDISTOVAN

*Landsverk er stovnur undir Vinnumálaráðnum og hevur um hendi vega- og havnamyndugleikauppgávur og byggiharrauppgávur. Stovnurin ráðleggur og ger ætlanir, útinnir, rekur og viðlíkaheldur landsvegir, havnir, bygningar og flogvallamál, herundir tyrlupallar.*

Landsverk, Tinghúsvegur 5, Postsmoga 78, Tórshavn, | Tel 340 800, Faks 340 801, lv@lv.fo, www.landsverk.fo

LANDSVERK byggir land



(endurlýsing)

# Leiðari til Dagstovnin við Botnánna í Kollafirði

Tórshavnar kommuna søkir eftir leiðara 40 tímar um vikuna til Dagstovnin við Botnánna í Kollafirði, at byrja 15. apríl 2008 ella eftir nærri avtalu.

Dagstovnurin við Botnánna er skipaður í eina barnagarðsstovu til 20 børn í aldrinum 5 til 7 ár og frítíðarskúla til 24 børn úr 1. og 2. flokki.

**Vit bjóða**
- eitt áhugavert starv í einum nærumhvørvi, har náttúran hevur stóran leiklut í gerandisdegnum, og har spælið fyllir nógv
- møguleika at seta dám á stovnin
- møguleika fyri ráðgeving og eftirútbúgving
- tú verður eisini partur av einum netbólki, sum kommunan skipar fyri millum dagstovnaleiðarnar

**Vit vænta at tú**
- er útbúgvin pedagogur og hevur leiðsluroyndir
- kanst arbeiða sjálvstøðugt og taka avgerðir
- hevur hugsjónir um virksemi á einum dagstovni, ið rúmar bæði barnagarði og frítíðarskúla
- hevur hug og áræði at skapa ein fjølbroyttan og tryggan gerandisdag við virðing og umsorgan fyri tí einstaka barninum, foreldrunum og starvsfeløgunum
- kanst virka í góðum samstarvi við starvsfelagar og foreldur
- dugir væl at samskifta, bæði innan- og uttanhýsis
- hevur evni og áræði at ganga nýggjar leiðir og sær møguleikar fram um vansar
- hevur teldukunnleika á brúkarastøði

**Setanarviðurskifti**
løn sambært sáttmála millum Føroya pedagogfelag og Kommunala arbeiðsgevarafelag Føroya.

**Meiri fæst at vita**
um starvið við at venda sær til Ingibjørg Berg, trivnaðarstjóra ella Katrin Petersen, deildarleiðara, telefon 30 20 10.

**Umsókn**
saman við viðmælum, upplýsingum um útbúgving og royndir skal vera Tórshavnar kommunu, Postboks 32, 110 Tórshavn í hendi í seinasta lagi týsdagin 1. apríl 2008.

Tórshavnar kommuna